## Bilradio hósdagin kl. 16.10

Millum innsløgini í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.10 er samrøða við Henning Sørensen frá HS Møblum á Hjalla, sum hevur tvey ellisakfør á síni framsýning. Talan er um hestavognar ella sonevndar jumbur. Eisini er samrøða við Niels Kára Nielsen frá Føroya MC um hvat tiltakið Powermeet snýr seg um.



*Henning Sørensen frá HS Møblum*



*Niels Kári Nielsen frá Føroya MC*



**TAXI**

*VW Milano Taxi Concept er bygdur eftir sama konsepti sum teir kendu London Taxi*

# OGNUR



Bilurin, sum er bygdur yvir undirvognin á nýggja VW Polo, varð herfyri sýndur fram á framsýningini Hannover Trade Show í Týsklandi.

Tað er kendi designstjórin hjá VW-konsernini Walter de Silva, sum hevur designað bilin.

# Powermeet á Bildeildini

Leygardagin 22. mai skipaði motorsúkklufelagið Føroya-MC fyri tiltakinum Powermeet á bildeildini á Tekniska skúlanum í Havn.

Powermeet gongur út upp á at testa hvussu nógvar hestakreftir ein motorsúkkla gevur á bakhjólinum í mun til tær hestakreftirnar, sum motorurin hevur. Súkklurnar vóru testaðar í einum testbonki.

Nógv fólk við motorsúkklum møttu til tiltakið, og tilsamans 20 súkklur vórðu testaðar.



**POWERMEET**

*Her er ein Honda Goldwing á veg í testbonkin*



**FYRITØKA**

*Peugeot 601 C Eclipse frá 1934*

# Peugeot 200 ár

Í ár eru 200 ár liðin síðan franska Peugeot verksmiðjan varð stovnað av brøðrunum Jean-Pierre og Jean-Frédéric Peugeot.

Franska Peugeot verksmiðjan er ein av elstu ídnaðarfyritøkum í heiminum. Verksmiðjan, sum varð stovnað í 1810, byrjaði við stálframleiðslu og varð seinni kend fyri sínar kaffimyllur og framleiðslu av amboðum. Eftir at hava framleitt súkklur í eina tíð byrjaði framleiðslan av motorakførum fyri umleið 120 árum síðan. Í dag er Peugeot partur av fronsku konsernini PSA Peugeot Citroën.



*Peugeot 403 vórðu gjørdir frá 1955 til 1966*

PEUGEOT

*Leyvan hevur verið búmerki hjá Peugeot so gott sum øll árini*